# Ísland fekk Barnabókmentavirðisløn Útnorðurráðsins




**Tað gjørdist íslendska Gerður Kristný, sum í ár fekk Bókmentavirðisløn Útnorðurráðsins fyri ungdómsbókina "Garðurin"**

Rigmor Dam

Aftur í ár var tað ein íslendingur, sum fór avstað við Barna- og ungdómsbókmentavirðisløn Útnorðurráðsins.

Í uppskoti úr Føroyum var "Várferðin til brúnna" eftir Rakel Helmsdal og úr Grønlandi var Lena Hansen innstillað við bókini "Sila úr Grønlandi"

Gerður Kristný fekk virðislønina á 60.000 kr handaða á hátíðarløtu í íslendska Altinginum.

Í grundgevingini fyri at lata henni virðislønina fyri bókina "Garðurinn" segði dómsnevndin:

"Bókin er sjáldsama fínt samansett. Mongu síðusøgurnar flætta saman fortíð og nútíð, og spurnartekin verður sett við tað kenda og tað ókenda."

Garðurinn, sum merkir kirkjugarðurin, er ungdómsskaldsøga, sum fer fram í Reykjavík. Hóast hon gongur fyri seg í nútíðini, er hon eisini merkt av fortíðini og tí søguliga. Í bókini brúkar Gerður Kristný, sum er kendur og produktivur íslendskur høvundur, ymisk bókmentasløg, so sum spøkilsissøguna, fantasy og søguligu skaldsøguna.

Hetta er 5. ferð Bókmentavirðisløn Útnorðurráðsins verður latin.



**Áður hava hesi fingið virðislønina:**

**2002** Andri Snær Magnason við bókini „Sagan af bláa hnettinum"
**2004** Kristín Steinsdóttir og Halla Sólveig Þorgeirsdóttir við "Engill í vesturbænum"
**2006** Bárður Oskarsson við "Ein hundur, ein ketta og ein mús"
**2008** Kristín Helga Gunnarsdóttir fyri Draugaslóð

# Stórur spenningur um Filmsprís Norðurlandaráðsins 2010

**Fimm markantir filmir dystast um hin víðagitnasta norðurlendska filmsprísin í ár**

Rigmor Dam

Tað eru fimm sera ymiskir filmir, sum dystast um vælumtókta filmsprísin hjá Norðurlandaráðnum í ár.

Prísurin, sum er áljóðandi 350.000 danskar krónur, verður latin einum filmi hvørs eyðkenni er, at hann er forankraður í norðurlendskari mentan, umframt, at hann skal hava eitt høgt listarligt virði og orginalitet. Eisini ynskir dómsnevndin, at filmurin, á einum høgum støði, samantvinnar filmslistarligu partarnar til eitt sannførandi heildarverk.

- Hetta er 7. ferð vit lata Filmsvirðisløn Norðurlandaráðsins, og tað er ein sonn frøi at kunna samla fimm so listarliga dygdargóðir filmir, sum eru á altjóða støði, sigur Hanne Palmquist, stjóri fyri Nordisk Film & TV Fond, som samskipar virðislønina fyri Norðurlandaráðið.

- Hóast vit umboða eitt lítið máløki, so verða tað hvørt ár framleiddir nýggir filmir, sum standa seg væl bæði í og uttan fyri norðurlond, sigur hon.

### Altjóða støði

Innstillaðu filmirnir hava luttikið á stóru altjóða filmsfestivalunum í Berlin, Venedig og Toronto og síðan eru teir seldir til stóran part av heiminum.

- Tí er tað eisini gleðiligt, at vit aftur í ár kunnu bjóða áskoðarunum eitt satt blómutyssi av dygdarfilmum, sum í heyst verða vístir í biografum í Danmark, Noregi, Svøríki, Finnlandi og í Íslandi.

(Og vit vóna og ynskja, at teir eisini verða vístir í Føroyum.)

### Nógvir prísir

Vinnarin verður almannakunngjørdur mikudagin 20. oktober og virðislønin verður handað í Reykjavik mikudagin 3. november á heystarfundinum hjá Norðurlandaráðnum.

Umframt filmsvirðirsløn-ina letur Norðurlandaráðið á hvørjum ári virðislønir innan tónleik, bókmentir og umhvørvi.

*rigmor@sosialurin.fo*

**Innstillaðu filmirnir eru:**

**SUBMARINO (SUBMARINO) - *Danmark***
Leikstjóri: Thomas Vinterberg
Manus: Thomas Vinterberg & Tobias Lindholm
Producari: Morten Kaufmann

**MIESTEN VUORO (STEAM OF LIFE) - *Finnland***
Leikstjórar & manus: Joonas Berghäll & Mika Hotakainen
Producari: Joonas Berghäll

**THE GOOD HEART (THE GOOD HEART) - *Ísland***
Leikstjóri & manus: Dagur Kári
Producari: Thor Sigurjonsson & Skuli Fr. Malmquist

**UPPERDOG (UPPERDOG) - *Noregi***
Leikstjóri & manus: Sara Johnsen
Producarar: Christian Fredrik Martin & Asle Vatn

**METROPIA (METROPIA) - *Svøríki***
Leikstjóri: Tarik Saleh
Manus: Stig Larsson, Fredrik Edin & Tarik Saleh
Producari: Kristina Åberg

